# Photo Story 3




Photo Story er eitt ókeypis forrit frá Microsoft, sum tú skjótt og lættliga kanst nýta til at gera eina framløgu av myndum, sum tú hevur í telduni. Myndirnar verða tiknar inn í forritið og kunnu viðgerast á ymsar hættir og settar saman við teksti, tónleiki og talu. Myndarøðin verður síðani gjørd til film, ið kann brúkast, sum hann er ella t.d. at leggja í Power Point.

Forritið kann takast niður frá:
http://www.microsoft.com/windowsxp/using/digitalphotography/photostory/default.mspx
Vel "**download photo story 3**". Vel síðani danskt mál og [download]. Goym forritið t.d. á skriviborðinum og vel "Kør". Photo story 3 krevur, at Media Player 10 (http://www.microsoft.com/windows/windowsmedia/mp10/default.aspx) er á telduni.

Tá forritið er lagt inn, er greitt at byrja.

### Tak myndirnar inn

Opna forritið og vel "Opret en ny fortælling" – klikk á 





Skíggjamynd

Setiborð

Tú kanst nú taka talgildu myndirnar inn frá harðdiski, myndatóli ella kortlesara og vel



Allar myndirnar, tú hevur innlisið, síggjast á klippiborðinum. Ansa eftir ikki at sløkkja/fjerna myndatólið, geyman, kortið ella fløguna, meðan myndarøðin verður redigerað.




Á hesi síðu eru fleiri amboð til myndatillaging.

Sker svartar kantar burtur við at trýsta á Remove black borders... , og at flyta ta ynsktu tilskering til tann partin av myndini, tú vilt vísa á. Tað er ikki altíð møguligt at fáa allar svartar kantar burtur.

Onnur amboð:




Lit-tillaging
Fáa reyð eygu burtur
Snara myndini
Onnur amboð

Tú kanst flyta myndirnar í myndarøðini við hesum knappunum



Fyri at tillaga tíðina hjá hvørjari mynd og hvussu tær skulu flyta seg ella Zooma, verður valt Næste > og síðani Tilpas bevægelse...

Gev gætur: *Ein mynd* kann væl vera ein mynd frá skannara.

## 2 arbeiðsrútur

Trýst á Næste > fyri at koma til næsta arbeiðsrút.

### Tekstur

Ynskir tú at at leggja tekst á myndirnar, skriva tekstin í tekstrútin. Snið kann broytast við at trýsta á ímyndirnar.

## Ljóð

Í hesum sama arbeiðsrúti er møguligt at leggja talu til myndirnar. Trýst á ”mikrofonina” fyri at kanna ljóðsetingina á telduna og minst til, at ein mikrofon má verða sett til telduna, fyri at hetta skal virka.




Fyri at seta tónleik inn trýstur tú á




Ynskir tú at seta tónleik inn, sum tú hevur liggjandi á telduni (skal vera .mp3 ella .mwa) trýstir tú á:




Ynskir tú, at forritið sjálvt skal skipa tónleikin til myndirnar, trýstir tú á:




## Liðugtgerð

Tá tú ert liðugur at tillaga tín film í Photo Story, kanst tú goyma fíluna og tann lidna filmin í tí sniði, tú ynskir.




Trýst á [Næste], navngev fíluna og tak støðu til, hvar filmurin skal goymast. Eisini verður tú spurdur, um tú ynskir at goyma “Projektið”, og hetta er hent, um tú seinni ætlar at broyta framløguna/filmin.